# Kendi meg sum eina



**Klaksvíksgentan Annika Kunoy bleiv eina stóra uppliving ríkari í summar, tá hon og koreanski maðurin, David Im, giftust og hildu brúdleyp í Seoul í Suðurkorea.**
**– Har er siðurin, at foreldrini bæði gjalda og leggja alt til rættis, so tey fáa eisini allar gávurnar.**
**Vit skuldu bara møta upp, sigur 23 ára gamla Annika Kunoy Im, sum býr og lesur í USA**

– Tað besta var at sleppa at lata meg í traditionella koreanska búnan og kongaligu kápuna. Tá kendi eg meg sum eina ordiliga asiatiska prinsessu. Men tað var eisini spennandi at uppliva munin á okkara og teirra mentan, tí nú skilji eg betri bakgrundina hjá David, og hvat verður væntað av okkum.

Orðini eigur 23 ára gamla Annika Kunoy, sum fyri umleið einum ári síðani fann útav, at tað skuldi vera hon og 22 ára gamli koreanski David Im restina av lívinum.

Hetta var bert fáar vikur eftir, at Annika var flutt til USA at lesa journalistikk. Tað var eisini í sambandi við lesnaðin at fast bleiv millum hana og David, sum lesur stjórnmálafrøði á sama lærustovni.

– Vit hittust fyrstu ferð á einari útferð fyri altjóða næmingar. Vit funnu útav, at vit høvdu nógvar felags meiningar og svingaðu væl, so aftaná eina tíð komu vit saman, fortelur Annika, sum beinanvegin játtaði, tá David, fimm mánaðir seinni, bað um hond hennara. Áðrenn hevði hann tó longu skrivað og biðið um hond hennara frá komandi verfaðirinum í Klaksvík!

### Vígd í Betesda og Seoul

Fyrst í august vóru so eini 100 fólk boðin í forkunnugt brúdleyp í Betesda í Klaksvík, har høvi var at hitta útlendska mannin, sum